# Uttanríkis- og vinnumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 5. apríl 2024 |
| Mál nr.: | 23/23485 |
| Málsviðgjørt: | RNA/JPP |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg
um
tøkugjald**

*Lógarøki*

**§ 1.** Partafeløg og smápartafeløg, sum reka vinnuliga alivinnu, skulu rinda tøkugjald eftir ásetingunum í hesi løgtingslóg.
*Stk. 2.* Sum alivinna eftir stk. 1 verður roknað virksemi á smoltstøðum og aling av fiski á sjónum.

**§ 2.** Feløg, fevnd av § 1, skulu í sambandi við tøku av alifiski rinda tøkugjald til landskassan.
*Stk. 2.* Avgjaldsgrundarlagið er grundað á mánaðarligu tøkuna av alifiski í kruvdari vekt, faldað við miðal altjóða marknaðarprísinum í sama mánaði.
*Stk. 3.* Við átekning í fíggjarlógini til inntøkujáttanina í fíggjarárinum verður ásett, hvør altjóða marknaðarprísur verður nýttur.
*Stk. 4.*  Miðal framleiðslukostnaðurin, K, verður roknaður og ásettur triðja hvørt ár við grannskoðaðu ársroknskapartølunum hjá alifeløgunum sbr. skjali 1.
*Stk. 5.* Í árunum harímillum verður metti miðal framleiðslukostnaðurin, PK, ásettur við at prístalviðgera K við støði í brúkaraprístalinum hjá Hagstovu Føroya, B, ið telur 50%, og vøkstri í fóðurprístalinum, F, ið telur 50%, sbrt. skjali 2.
*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um tey roknskapartøl, sum alifeløgini skulu lata inn, so miðal framleiðslukostnaðurin kann gerast upp.
*Stk. 7.* Miðal framleiðslukostnaðurin K verður almannakunngjørdur á heimasíðuni hjá avvarðandi stjórnarráði fyrstu ferð tann 1. januar 2025. Eftir hetta verða PK og nýggjar uppgerðir av K almannakunngjørdar 1. januar á hvørjum ári.

**§ 3.** Tøkugjaldið eftir § 2 verður ásett sum ásett í skjali 3.
*Stk. 2.* Gjald verður ikki rindað av tøku, ið landsdjóralæknin hevur álagt alara at fremja, og sum ikki kann seljast til marknaðarvirði.

*Stk. 3.* Upplýsingar um mánaðarligu tøkuna av alifiski skulu innan 15. í mánaðinum aftan á tøkuna latast TAKS. Um upplýsingarnar ikki verða latnar TAKS innan ásettu freistina, verður sekt upp á kr. 1.000 løgd afturat tøkugjaldinum fyri avvarðandi mánað.
*Stk. 4.* Tøkugjaldið fellur til gjaldingar í fýra gjøldum ávikavist 1. februar, 1. mai, 1. august og 1. november við gjaldfreist tann 20. í mánaðinum. Verður gjaldið ikki goldið rættstundis, verður renta roknað við 0,7% fyri hvønn byrjaðan mánað frá gjalddegnum.

**§ 4.** 2% av tøkugjaldinum fella til kommunurnar.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ásetur nærri reglur um, hvussu inntøkan verður býtt millum kommunurnar og um útgjald.

*Skylda at lata upplýsingar um fóðurprís*

**§ 5.** Feløg, fevnd av § 1, skulu á hvørjum ári lata inn upplýsingar um miðal fóðurprísin fyri hvørt kilo fyri tíðarskeiðið, ið gongur frá 1. november til 31. oktober.
*Stk. 2.* Upplýsingar sbrt. stk. 1 skulu latast landsstýrismanninum í seinasta lagi 10. desember.
*Stk. 3.* Upplýsingar um miðal fóðurprísir fyri kilo, ið skulu nýtast at prístalsviðgera ásetta miðal framleiðslukostnaðin fyrstu ferð, tann 1. januar 2026, skulu latast landsstýrismanninum í seinasta lagi 10. desember 2025.
*Stk. 4.* Upplýsingarnar í stk. 3 eru miðal fóðurprísur fyri kilo fyri tíðarskeiðini 1. november 2022 til 31. oktober 2023, 1. november 2023 til 31. oktober 2024 og 1. november 2024 til 31. oktober 2025.
*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin kann, tá tað verður mett neyðugt fyri at sanna prísásetingina millum feløg, sum eru í áhugafelagsskapi sbrt. § 37 a í løgtingslógarkunngerð nr. 109 frá 19. september 2023 um landsskatt og kommunuskatt, áleggja hesum at senda inn uppgerðirnar, heruppií skrivligt skjalprógv sbrt. § 118 a, stk. 4 í løgtingslógarkunngerð nr. 109 frá 19. september 2023 um landsskatt og kommunuskatt, sum vísir, hvussu ásetingin av prísum og treytum á fóðri, eru farin fram.
*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð nærri reglur um, hvussu upplýsingar um fóður skulu latast.

*Eftirlit*

**§ 6**. Øll, ið eru fevnd av hesi lóg, hava skyldu at leggja fyri TAKS, tá hetta verður kravt, tey skjøl, ið kunnu verða kravd til sannan av uppgerðini av gjaldinum, heruppií eisini uppgerðini av framleiðslukostnaðinum.
*Stk. 2.* TAKS fremur eftirlit og útvegar upplýsingar, sum verða mettar neyðugar fyri at fremja eftirlit eftir hesi løgtingslóg.

*Kærumøguleikar*

**§ 7**. Avgerðir, tiknar hesi løgtingslóg, kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.

*Pantiheimild*

**§ 8**. Avgjald, skattur og sekt, sum stava frá hesi løgtingslóg, og eru fallin til gjaldingar, kunnu saman við rentum og innkrevjingarkostnaði verða innheintað við panting.
*Stk. 2.* TAKS fremur pantingina eftir reglunum í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt fyri innkrevjing av skattum.

*Revsing*

**§ 9**. Landsstýrismaðurin kann áleggja tí, sum ikki letur, ella ikki rættstundis letur, landsstýrismanninum upplýsingar, sum kunnu krevjast sambært § 2, § 5 og § 6, dagliga ella vikuliga sekt til undanlátið ella brotið heldur uppat.

*Stk. 2.* Revsiábyrgd kann verða áløgd løgfrøðiligum persónum eftir reglunum í 5. kapitli í revsilógini.

**§ 10.** Er ikki hægri revsing ásett í aðrari lóggávu, verður við sekt revsaður tann, sum tilætlað ella av grovum ósketni gevur ófullfíggjaðar, skeivar ella villleiðandi upplýsingar ella tigur um viðurskifti, sum hava týdning fyri mál eftir § 2, § 5 ella § 6, sum upplýsingarnar verða savnaðar til.

**§ 11.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2025, og samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 64 frá 15. mai 2024 um loyvisgjald á alivinnu, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 75 frá 1. juni 2023.

**Skjal 1**

## Uppgerð av miðal framleiðslukostnaði (K)

*Allýsingar*
Miðal framleiðslukostnaðurin (K) verður gjørdur upp við støði í grannskoðaða ársroknskapinum. Útrokningarhátturin er hesin:

*Framleiðslukostnaður=*
+ Kostnaðir til rávørur og hjálpartilfar
+ Goymslubroytingar
+ Aðrir uttanhýsis kostnaðir
+ Starvsfólkakostnaðir
+ Av- og niðurskrivingarkostnaðir
÷ Sølu- og flutningskostnaðir

*Kostnaðir til rávørur og hjálpartilfar:* Kostnaðir til rávørur og hjálpartilfar eru sum oftast uppgivnir í rakstrarroknskapinum sum ein serstakur postur. Tó upplýsa summar fyritøkur einans aðrar uttanhýsis kostnaðir í einum bruttoposti, har kostnaðir til rávørur og hjálpartilfar eru innroknaðir. Í slíkum føri eru tað einans aðrir uttanhýsis kostnaðir, sum verða nýttir í útrokningini.

*Goymslubroytingar:* Her er talan um goymslubroytingar av lidnum vørum og vørum í gerð. Virðið á goymslubroytingunum er tað í rakstrarroknskapinum uppgivna virðið.

*Aðrir uttanhýsis kostnaðir:* Aðrir uttanhýsis kostnaðir eru uppgivnir í rakstrarroknskapinum. Summar fyritøkur uppgeva aðrar uttanhýsis kostnaðir í einum bruttoposti, sum eisini umfata kostnaðir til rávørur og hjálpartilfar. Aðrar fyritøkur skilja ímillum aðrar uttanhýsis kostnaðir og kostnaðir til rávørur og hjálpartilfar. Fyri útrokningina er tað umráðandi, at bæði aðrir uttanhýsis kostnaðir og kostnaðir til rávørur og hjálpartilfar verða tiknir við.

*Starvsfólkakostnaðir:* Starvsfólkakostnaðir eru teir, ið eru uppgivnir í rakstrarroknskapinum.

*Av- og niðurskrivingar:* Tað eru av- og niðurskrivingarnar í rakstrarroknskapinum, sum skulu nýtast.

*Sølu- og flutningskostnaðir:* Sølukostnaðir og flutningskostnaðir, ið knýta seg at fáa vørur til marknað, verða ikki mettir at knýta seg beinleiðis at framleiðsluni, og skulu tí ikki telja við í uppgerðini av framleiðslukostnaðinum.

Viðmerking: Tøkugjaldið er ikki at meta sum ein framleiðslukostnaður. Er tøkugjaldið tikið við sum framleiðslukostnaður undir t.d. aðrir uttanhýsis kostnaðir, skal tað trekkjast frá í uppgerðini av framleiðslukostnaðinum.

Miðal framleiðslukostnaðurin K verður gjørdur upp á hendan hátt:

1. Framleiðslukostnaðurin hjá einstøku alifyritøkuni verður útroknaður og deildur við tøkuni í kruvdari vekt fyri soleiðis at fáa framleiðslukostnaðin pr. kg.

2. Miðal framleiðslukostnaðurin K verður funnin sum eitt einkult miðaltal. Hetta verður gjørt við at leggja saman framleiðslukostnaðin pr. kg fyri einstøku alifeløgini og síðani deila við tali av alifeløgum.

**Skjal 2**

**Prístalsviðgerð av metta miðal framleiðslukostnaðinum (PK)**

Brúkaraprístalið = B

- Brúkaraprístalið (B) er brúkaraprístalið, sum Hagstova Føroya framleiðir.
- Hagstovan almannakunnger brúkaraprístalið fýra ferðir um árið (februar, mai, august og november).
- Til uppgerðina av metta miðal framleiðslukostnaðinum (PK), verður almannakunngjørda brúkaraprístalið fyri august mánað nýtt.

Fóðurprístalið = F

- Fóðurprístalið (F) verður útroknað við støði í fóðurprísunum, ið føroysku ali- og smoltfyritøkurnar rinda fyri fóður.
- Til uppgerðina av metta miðal framleiðslukostnaðinum (PK), verður miðal fóðurprísurin pr. kg. fyri ári (1. november til 31. oktober) nýttur.
- Fóðurprístalið (F) verður funnið sum eitt einkult miðaltal, har fóðurprísurin frá einstøku alifyritøkunum telur eins nógv í útrokningini.

Metti miðal framleiðslukostnaðurin = PK

- PK= K * (B+F)/2”

**Skjal 3**

**Tøkugjaldsstigin, ið vísir, hvussu gjaldið er treytað av marknaðarprísinum**

Gjaldið verður ásett soleiðis:

P = miðal altjóða marknaðarprísur í DKK pr. kg.
K = mettur miðal framleiðslukostnaður í DKK pr. kg.

- Er P minni enn K, er gjaldið 0,5%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K, men minni enn K pluss 5 kr., er gjaldið 2,5%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 5 kr., men minni enn K pluss 15 kr., er gjaldið 5,0%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 15 kr., er gjaldið 7,5%.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Tað er eydnast samgonguflokkunum at gera eina langtíðarsemju við Sambandsflokkin um eina nýggja gjaldsskipan fyri alivinnuna, sí fylgiskjal 1. Talan er um eina tvíliðaða skipan, har annar parturin er ein nýggj tøkugjaldsskipan, meðan hin parturin er ein nýggjur serskattur. Hetta lógaruppskotið snýr seg um at seta nýggju tøkugjaldsskipanina í verk. Skipanin við serskattinum verður eftir ætlan løgd fyri Løgtingið í heyst.

Lógin um loyvisgjald á alivinnuna er broytt fleiri ferðir seinastu árini. Hetta er óheppið, tí ov títtar broytingar gera tað avbjóðandi hjá alivinnuni at planleggja virksemi fram í tíð. Langtíðarsemjan ger, at ein varandi skipan kann setast í verk, har alifyritøkurnar, um ikki okkurt heilt óvæntað stingur seg upp, kunnu kenna seg tryggar við, at gjaldsskipanin ikki veður broytt aftur fyrr enn í fyrsta lagi í 2032.

Semjupartarnir ynskja at broyta verandi tøkugjaldsskipan soleiðis, at hon í minni mun stýrir atferðini hjá alifyritøkunum, serliga tá hesar skulu gera langtíðar sáttmálar. Ein veikleiki við verandi skipan er, at váðin hjá allifyritøkunum er lutfalsliga stórur, tá langtíðar sáttmálar verða gjørdir. Í uppskotinum er ein nýggjur tøkugjaldsstigi, ið minkar munandi um hendan váðan.

Ynski er eisini um at broyta uppgerðina av framleiðslukostnaðinum. Farið verður yvir til eina skipan, har framleiðslukostnaðurin verður ásettur triðja hvørt ár við støði í roknskapartølunum hjá alifeløgunum. Í árunum har ímillum verður framleiðslukostnaðurin prístalvsviðgjørdur eftir einum føstum leisti. Ein slíkur uppgerðarháttur fer sannlíkt at minka um árligu sveiggini í framleiðslukostnaðinum.

At ein breið politisk semju er fingin í lag, er eitt gott høvi at gera eina nýggja lóg heldur enn eina broyting í verandi løgtingslóg, sum, hóast hon er frá 2014, er vorðin broytt í fleiri umførum.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi lóg á økinum er løgtingslóg nr. 64 frá 15. mai 2014 um loyvisgjald á alivinnu, sum broytt við løgtingslóg nr. 162 frá 24. desember 2015, løgtingslóg nr. 180 frá 21. desember 2018, løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021 og løgtingslóg nr. 75 frá 1. juni 2023.

*Stutt um lógina*

Sambært galdandi lóg, sum seinast varð broytt 1. juni 2023, er grundarlagið fyri tøkugjaldinum tann mánaðarliga tøkan av alifiski í kruvdari vekt faldað við miðal altjóða marknaðarprísinum fyri sama mánað. Gjaldið verður ásett sum eitt ávíst prosent av gjaldsgrundarlagnum. Framleiðslukostnaðurin, K, er stýrandi fyri, hvør prosentsatsur skal nýtast.

Tað er umráðandi at hava fyri eygað, at loyvisgjaldið á alivinnuna er ikki at meta sum ein skattur, men heldur sum eitt nýtslugjald, sum landsmyndugleikar áleggja fyri rættin at gagnnýta føroysku aliøkini.

Grundsjónarmiðið við verandi skipan er, at tá prísurin á alifiski er høgur, so eigur gjaldið at vera hægri. Minstagjaldið upp á 0,5% verður einans goldið, tá miðal altjóða marknaðarprísurin

er lægri enn framleiðslukostnaðurin. Tá miðal altjóða marknaðarprísurin er hægri enn framleiðslukostnaðurin, byrjar skipanin við stigvísum hækkingum.

Talvan niðanfyri vísir gjaldið treytað av altjóða marknaðarprísinum, tá miðal framleiðslukostnaðurin, K, er 52,37 kr, sum framleiðslukostnaðurin er ásettur til fyri tíðarskeiðið 1. apríl 2024 til 1. oktober 2024.

| **Prísur** | | **Gjald** |
|---|---|---|
| P<K | P < 52,37 kr. | 0,5% |
| K ≤ P < K+5 | 52,37 kr. ≤ P < 57,37 kr. | 2,5% |
| K+5 ≤ P < K+15 | 57,37 kr. ≤ P < 67,37 kr. | 5,0% |
| K+15 ≤ P < K+20 | 67,37 kr. ≤ P < 72,37 kr. | 7,5% |
| K+20 ≤ P < K+25 | 72,37 kr. ≤ P < 77,37 kr. | 10,0% |
| K+25 ≤ P < K+30 | 77,37 kr. ≤ P < 82,37 kr. | 12,5% |
| K+30 ≤ P < K+35 | 82,37 kr. ≤ P < 87,37 kr. | 15,0% |
| K+35 ≤ P < K+40 | 87,37 kr. ≤ P < 92,37 kr. | 17,5% |
| P≥K+40 | P ≥ 92,37 kr. | 20,0% |

Við átekning í løgtingsfíggjarlógini fyri fíggjarárið 2023 er ásett, at mánaðarligi miðalprísurin í evrum fyri kruvdan laks sambært "Fish Pool Index" verður brúktur sum altjóða marknaðarprísur til útrokning av avgjaldsgrundarlagnum undir loyvisgjaldinum.

Umroknað verður til danskar krónur við at nýta sentralkursin hjá Danmarks Nationalbank.

Umframt tøkugjald rinda fyritøkur í alivinnuni eisini vanligan partafelagsskatt og kapitalvinningsskatt á sama hátt, sum aðrar fyritøkur. Eigarar av alifyritøkum rinda skatt av vinningsbýti, tá ið fyritøkurnar rinda út vinningsbýti til eigararnar.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Tá lógin varð broytt seinast varð endamálið at tillaga lógina, soleiðis at alifyritøkurnar skuldu gjalda lutfalsliga meira, tá laksaprísurin var høgur. Eisini varð ásett, at miðal framleiðslukostnaðurin skuldi gerast upp hvørt hálvár.

Undir viðgerðini av uppskotinum, tá ið nýggja tøkugjaldið varð samtykt, boðaði landsstýrið frá, at tað fór at viðgera ávísar avbjóðingar, sum vórðu reistar undir viðgerðini og síðani alment. Tað var serliga við atliti at liðugtvørum, ið verða seldar við langtíðar sáttmálum. Síðani hevur verið arbeitt við at gera eina tvíliðaða skipan við einum tøkugjaldi og einum serskatti, ið kundi fáa breiða politiska undirtøku.

Arbeiðssetningurin hevur verið at fáa eina skipan, ið byggir á fylgjandi mál og grundreglur:

- At fáa eina tvørpolitiska semju um eina varandi skipan, ið røkkur tvørturum valskeið og tryggjar landinum eitt rímiligt og rættvíst gjald fyri rættin at ala í Føroyum og vinnuni ein støðugan karm, ið gevur best møguligt grundarlag at leggja virksemið til rættis.
- At skipanin, alt tað ber til, ikki stýrir atferðini hjá vinnuni, tá tað snýr seg um hvussu virksemið verður lagt til rættis, heruppií framleiðslu, virðisøking og íløgur í burðardyggari aling.
- At skipanin tryggjar altjóða kappingarføri hjá vinnuni.

*Stigin*
Við uppskotinum verður skotið upp at broyta stigan soleiðis, at ovastu stigini verða tikin burtur so at hægsta stigið verður 7,5%. Umframt at fáa eina meira haldføra skipan er endamálið ein roynd at bøta um ta avbjóðing, sum skipanin er í mun til virksemið við virðisøking av laksi í Føroyum.

*Serskattur*
Afturat tøkugjaldinum hevur verið arbeitt við eini loysn við einum serskatti. Ein slík loysn krevur eitt størri greiningararbeiði at lýsa, hvussu ein tílík skipan kundi verðið samansett. Neyðugt er eisini at gera eina lýsing av avleiðingunum av eini tílíkari skipan.

Sjøtul er settur á hetta arbeiðið, sum eftir ætlan skal vera liðugt, soleiðis at tað kann leggjast fyri Løgtingið tíðliga í heyst.

Viðvíkjandi skattasatsi, eru samgonguflokkarnir og Sambandsflokkurin vorðnir samdir um ein serskatt upp á 8%. Viðmerkjast skal tó, at tað er trupult at koma við ítøkiligum metingum um inntøkur frá einum slíkum serskatti, fyrrenn arbeiðið at greina skattapartin er liðugt.

*Framleiðslukostnaður*
Síðani framleiðslukostnaðurin gjørdist partur av tøkugjaldsskipanini, er hesin gjørdur upp tvær ferðir, og hevur tað ikki verið heilt uttan avbjóðingar. Talan er um eitt vigað tal, og er framleiðslukostnaðurin tí viðkvæmur fyri felli og broytingum í framleiðslukostnaðum. Eisini er tað ein veikleiki, at tað í verandi lóg ikki eru ásetingar um eftirlit, ið heimila, at tøl, ið eru partur av uppgerðini, kunnu verða eftirkannað, skuldi tørvur verið á tí.

Undir fyrireikingararbeiðinum at gera kunngerð nr. 93 frá 25. juli 2023 um roknskapartøl til uppgerð av miðal framleiðslukostnaðinum kom fram, at sølu- og flutningskostnaðir ikki áttu at verða tiknir við í uppgerðina av framleiðslukostnaðinum. Hesir kostnaðirnir máttu kortini takast við, av tí at hetta var ásett í skjali 1 til løgtingslógina, ið tá var blivin samtykt. Sambært skjali 1 í verandi løgtingslóg, skuldi posturin “aðrir uttanhýsis kostnaðir” takast við í uppgerðina, og tískil takast við í uppgerðina av framleiðslukostnaðinum K.

Áðurnevndu orsakir merkja, at tað er trupult at meta um, hvussu framleiðslukostnaðurin kann væntast at hátta sær fram í tíð.

Ein av orsøkunum til, at framleiðslukostnaðurin gjørdist liður í tøkugjaldsskipanini var politiski viljin at møta vinnuni í mun til tann stóra prísvøkstur, sum var um hetta mundið – serliga á fóðri. Á henda hátt varð atlit tikið at óvanliga stóra útreiðsluvøkstrinum í alingini.

Vísandi til tær avbjóðingar, ið hava verið í sambandi við at gera upp framleiðslukostnaðin, umframt eyka umsiting, verður skotið upp at broyta skipanina við framleiðslukostnaðinum nakað.

Samgonguflokkarnir og Sambandsflokkurin eru komnir ásamt um, at framleiðslukostnaðurin skal gerast upp við støði í seinast grannskoðaðu roknskapartølunum hjá feløgunum, fyri roknskaparárið 2023, pr. 1. januar 2025.

Fyri at lætta um umsitingina av skipanini, verður framleiðslukostnaðurin fyri 2026 og 2027 prístalsviðgjørdur. Skotið verður upp at prístalsviðgera við støði brúkaratalinum, B, og fóðurprístalinum, F. Fjórða árið verður miðal framleiðslukostnaður gjørdur upp av nýggjum.

Fyri at kunna prístalsviðgera miðal framleiðslukostnaðin fyri sveiggj í fóðurkostnaði verður skotið upp, at feløgini fyrsta árið skulu lata inn upplýsingar um miðal fóðurprís fyri kilo fyri fyri trý ár – soleiðis at til ber at gera eitt indeks. Eftir hetta skulu hesar upplýsingar latast árliga.

Harumframt verður í lógaruppskotinum skotið upp, at TAKS verður eftirlitsmyndugleiki, og í hesum sambandi verða heimildir at gera eftirlit lagdar til TAKS.

Av tí at uppgerðin av framleiðslukostnaðinum, umframt prístalsviðgerð, er treytað av upplýsingum, ið feløgini skulu lata, verður skotið upp at áseta revsireglur, um so er, at feløg ikki lata upplýsingar ella lata landsstýrismanninum skeivar upplýsingar.

Nú farið er undir at gera eina nýggja lóg, verður skotið upp at gera smávegis broytingar fyri greidleika skyld. Ítøkiliga er talan um broytingar í § 1 og 2, í sambandi við virkisøki.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Við lógaruppskotinum vónar landsstýrismaðurin at betra um karmarnar, ið vinnan hevur at virka undir, samstundis sum eitt munandi, men rímiligt gjald, verður rindað fyri rættin at ala á føroysku firðunum.

Skotið verður upp at broyta tøkugjaldsstigan soleiðis, at hann endar á 7,5% og ikki á 20%, sum eftir galdandi løgtingslóg. Harumframt verður skotið upp, at miðal framleiðslukostnaðurin verður ásettur triðjahvørt ár, og prístalsviðgjørdur millumliggjandi ár.

Avgjaldsgrundarlagið er tann nøgdin, sum alifelagið hevur tikið, í kruvdari vekt, ein ávísan mánað, faldað við miðal altjóða marknaðarprísinum sama mánað. Tøkugjaldið verður funnið við, at avgjaldsgrundarlagið verður faldað við viðkomandi prosentsatsi, ið er stigvíst hækkandi, alt eftir hvør miðal altjóða marknaðarprísurin er.

Sambært nýggju ásetingunum í lógini, verða gjøldini frameftir hesi, tá P er miðal altjóða marknaðarprísur í DKK pr. kg., og K er miðal framleiðslukostnaðurin í DKK pr. kg.

- Er P minni enn K, er gjaldið 0,5%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K, men minni enn K pluss 5 kr., er gjaldið 2,5%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 5 kr., men minni enn K pluss 15 kr., er gjaldið 5,0%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 15 kr., er gjaldið 7,5%.

Hildið verður fast í grundregluni um at krevja eitt nýtslugjald fyri framíhjárættindi at gagnnýta føroysku aliøkini. Nýtslugjald verður kravt, óansæð hvussu laksaprísurin háttar sær. Er laksaprísurin lægri enn metti miðal framleiðslukostnaðurin, er gjaldið 0,5%.

Endamálið við broytingini er at bøta um ta avbjóðing, sum skipanin er í mun til virksemi við virðisøking av laksi í Føroyum. Stigini verða fyrsta árið ásett við støði í miðal framleiðslukostnaðinum hjá alifyritøkunum. Annað og triðja árið verður prístalviðgjørt og verður stigin hesi árini ásettur við støði í prístalviðgjørda framleiðslukostnaðinum PK.

Eisini eru nýggjar ásetingar um eftirlit og revsing partur av uppskotinum. Endamálið er at tryggja heimild til at fremja eftirlit og at áseta revsitiltøk, um tað skuldi verið neyðugt.

Mánaðarligi miðalspottprísurin í evrum fyri kruvdan laks sambært “Fish Pool Index” verður framvegis brúktur sum altjóða marknaðarprísur at rokna avgjaldsgrundarlagið undir tøkugjaldinum.

Umroknað verður framvegis til danskar krónur við at nýta sentralkursin hjá Danmarks Nationalbank.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Nýggja gjaldsskipanin verður sum kunnugt tvíliðað - við einum tøkugjaldi og einum serskatti. Hetta uppskotið snýr einans um tøkugjaldspartin, og tí eru fíggjarligu avleiðingarnar í hesum høpi einans tær, ið stava frá tøkugjaldinum. Í sambandi við at uppskotið um ein nýggjan serskatt verður lagt fyri Løgtingið í heyst, verður ein neyvari lýsing av fíggjarligu avleiðingunum av nýggju gjaldsskipanini, sum heild, gjørd fyri føroyska búskapin. Nýggja skipanin fær eftir ætlan gildi frá 1. januar 2025, og uppskotið hevur sostatt ikki avleiðingar fyri fíggjarárið 2024.

Í talvuni niðanfyri sæst ein simulering av inntøkunum, sum tær høvdu verið, um galdandi stigi og nýggi stigin høvdu verið galdandi frá 1. januar 2022 fram til 31. desember 2025. Fyri árini 2022 og 2023 er staðfest tøka og søguligir spottprísir nýttir. Fyri árini 2024 og 2025 er meting gjørd av tøkuni og forwardprísir nýttir. Árligi framleiðslukostnaðurin K er mettur út frá roknskapartølum. Lægri framleiðslukostnaðurin í 2025 er ein avleiðing av, at sølu- og flutningskostnaðir, sambært uppskotinum, ikki verða tiknir við, tá árligi framleiðslukostnaðurin verður gjørdur upp.

**Talva 1**

**Simulering av inntøkunum frá tøkugjaldinum 2022 - 2025 við verandi og nýggja tøkugjaldsstiganum**

| | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 |
|---|---|---|---|---|
| *Mettur framleiðslukostnaður (K)* | *42* | *50* | *52* | *47* |
| **Verandi skipan (0,5% - 20%)** | 493.736.427 | 283.547.555 | 396.061.032 | 531.753.716 |
| **Nýggja skipanin (0,5% - 7,5%)** | 322.098.275 | 221.646.015 | 330.776.468 | 384.074.264 |
| **Munur** | -171.638.151 | -61.901.540 | -65.284.564 | -147.679.452 |

Kelda: Útrokningar hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum grundaðar á forwardprísir frá mars 2024 og framskrivað tøkutøl fyri 2024 og 2025 og metta miðal árliga framleiðslukostnaðin (K). Forwardprísirnir fyri 2025 eru setttir at vera teir somu sum fyri 2024.

Talvan lýsir munin millum báðar avgjaldsstigarnar. Ein natúrlig avleiðing av, at nýggi stigin endar á 7,5% er, at minni tøkugjald verður rindað, tá laksaprísirnir eru høgir. Hetta sæst aftur í talvuni. Út frá givnu fortreytunum, so høvdu alifyritøkurnar rindað uml. 147 mió kr. minni í tøkugjaldi í 2025, um nýggi tøkugjaldsstigin verður nýttur.

Sum kunnugt, er ætlanin at innføra ein serskatt upp á 8% frá ársbyrjan 2025. Sum nevnt, er trupult at meta um avleiðingarnar av einum tílíkum skatti, fyrrenn arbeiðið at greina skattliga partin er liðugt. Tá uppskotið um nýggja serskattin verður lagt fyri Løgtingið í heyst, verða neyvari útrokningar gjørdar við støði í nýggja tøkugjaldsstiganum, nýggja serskattinum og teimum nýggjastu hagtølunum. Tá ber til at gera eina neyvari meting av fíggjarligu avleiðingunum fyri 2025.

*Avleiðing fyri partafelagsskattin*

Tøkugjaldið kann sambært skattalógini § 33, nr. 18, dragast frá skattskyldugu inntøkuni. Tá tøkugjaldið minkar, sum tað sannlíkt ger við nýggju skipanini, verður úrslitið áðrenn skatt størri. Alt annað líka merkir hetta, at inntøkurnar frá partafelagsskattinum fara at hækka. Broytingin merkir, at um úrslitið hjá alivinnuni veksur við áleið 147 mió. kr. í 2025, so fáa landið og kommunurnar, alt annað líka, áleið 27 mió. kr. meira inn í partafelagsskatti. Av hesum fáa kommunurnar 30 % og landið fær 70 %.

*Avleiðing fyri skatt á vinningsbýti*

Skatturin av vinningsbýti verður goldin eftir, at bæði tøkugjald og partafelagsskattur eru trekt av vinninginum hjá alifyritøkunum. Sambært uppskotinum minkar tøkugjaldið, sum alt annað

líka merkir hægri úrslit eftir skatt, og tá er meira eftir at gjalda partaeigarum í vinningsbýti og harvið hægri inntøkur frá vinningsbýtisskatti.

Nýggja gjaldsskipanin fer eftir ætlan eisini at fevna um ein serskatt upp á 8%. Fyrr enn arbeiðið at greina skattliga partin er liðugt, er trupult neyvt at meta um skattligu avleiðingarnar. Hetta verður gjørt, tá uppskotið um serskatt verður lagt fyri Løgtingið komandi heyst.

*Kommunurnar*
Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar í og við, at tøkugjaldið verður drigið frá, tá skattskylduga inntøkan verður uppgjørd. Tað merkir, at tá inntøkurnar til landskassan frá tøkugjaldinum minka, samanborið við tað, ið kundi væntast at koma inn við verandi skipan, so merkir tað, at úrslitið hjá vinnuni fyri skatt verður tað størri og at meira verður til kommunurnar í partafelagsskatti.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Við lógaruppskotinum verður eftirlitsuppgávan løgd til TAKS.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Alifyritøkurnar verða ávirkaðar av uppskotinum. Nýggi tøkugjaldsstigin ger, at alifyritøkurnar fara at rinda minni í tøkugjaldi, tá laksaprísirnir eru høgir. Í talvu 1 omanfyri sæst, at alifyritøkurnar høvdu rindað áleið 65 mió. kr. minni í 2024 og áleið 147 mió. kr. minni í 2025, um nýggi stigin var galdandi hesi bæði árini.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Ongin viðkomandi millumtjóðasáttmáli er á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Ongin viðkomandi tvørgangandi millumtjóðasáttmáli er á økinum.

**2.9. Markaforðingar**
Lógaruppskotið verður ikki mett at elva til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Í lógaruppskotinum verður ásett, at landsstýrismaðurin kann áleggja tí, sum ikki letur kravdar upplýsingar, sekt. Harumframt kunnu feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í 5. kapitli í revsilógini.

Um ikki harðari revsing er ásett eftir aðrari lóg, verður tann revsaður við sekt, sum tilætlað ella av grovum ósketni gevur ófullfíggjaðar, skeivar ella villleiðandi upplýsingar ella tigur um viðurskifti, sum hava týdning fyri mál eftir § 2, § 5 ella § 6, sum upplýsingarnar verða savnaðar til.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Tøkugjaldið er eitt nýtslugjald, sum landsmyndugleikarnir áleggja fyri framíhjárættin at gagnnýta føroysku alifirðirnar.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur alifeløgunum eina skyldu til at lata roknskapartøl, ið eru kostnaðargrundarlagið fyri uppgerðini av miðal framleiðslukostnaðinum.

Harumframt verður við lógaruppskotinum skotið upp at prístalsviðgera framleiðslukostnaðin, K, 2. og 3. árið eftir hann fyrstu ferð er ásettur. Í hesum sambandinum skulu alifeløgini árliga lata landsstýrismanninum upplýsingar um miðal fóðurkostnað fyri kilo.

Sambært lógaruppskotinum hevur vinnan skyldu til at leggja fyri TAKS, tá hetta verður kravt, tey skjøl, ið kunnu verða kravd til sannan av uppgerðini av gjaldinum, heruppií eisini uppgerðini av framleiðslukostnaðinum. Harumframt hevur TAKS heimild til at fremja eftirlit og útvega upplýsingar, sum verða mettar neyðugar fyri at kunna fremja eftirlit eftir reglunum í hesi lóg.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Í § 2, stk. 6, verður heimilað landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um tey roknskapartøl, sum alifeløgini skulu lata inn, so miðal framleiðslukostnaðurin kann gerast upp.

Sambært § 5, stk. 6, í lógaruppskotinum verður heimilað landsstýrismanninum við kunngerð at áseta nærri reglur um latan av upplýsingum um fóðurkostnað.

Endamálið við kunngerðarheimildunum er at tryggja, at til ber at biðja um neyðugu tølini, ið eru grundarlagið undir uppgerðunum.

Sambært § 6 í lógaruppskotinum verður eftirlitsuppgávan løgd til TAKS.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**

Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

## 2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Lógaruppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Í sambandi við at tað eydnaðist at fáa eina langtíðar semju, er avgjørt at gera eina nýggja lóg heldur enn at gera enn eina broyting í verandi lóg. Talan er í stóran mun um somu ásetingar sum í verandi løgtingslóg, tó við høvuðsstættunum í semjuni millum samgonguna og Sambandsflokkin.

**Til § 1**
*Til stk. 1 og stk. 2*
Í sambandi við at nýggj lóg verður gjørd, verður, fyri greidleika skyld, skotið upp at broyta § 1. Sambært § 1, 1. pkt. í galdandi lóg er ásett: "*Skyldu til at rinda tøkugjald sbrt. hesari løgtingslóg hava allar fyritøkur og allir einstaklingar, sum reka vinnuliga alivinnu í Føroyum. ...*"

Í alilógini § 6 d er ásett, at aliloyvi kann verða latið: "... partafeløgum og smápartafeløgum, sum eru skrásett hjá Skráseting Føroya, ella eru fráboðað Skráseting Føroya sum undir stovnan. Kapitalpartar skulu gevast út við navni."

Harvið kunnu aliloyvi ikki latast einstaklingum, og tí verður skotið upp at taka orðið "einstaklingar" úr §§ 1 og 2 í løgtingslógini.

Av tí at allar fyritøkurnar, sum í dag hava aliloyvi, eru skipaðar sum partafeløg, so hevur broytingin ikki avleiðingar fyri vinnuna.

Í § 1, stk. 2, verður nágreinað, at sum alivinna verður roknað virksemi á smoltstøðum og aling av fiski á sjónum. Í galdandi løgtingslóg stendur "*Sum alivinna verður roknað virksemi á smoltstøðum, aling av fiski í sjónum og kryvjing á landi.*" Nýggja orðingin er uttan praktiskan týdning av tí, at tað í § 2 er ásett, at feløg, fevnd av § 1, skulu rinda avgjald til landskassan í sambandi við tøku.

**Til § 2**
*Til stk. 1*
Broytingin í § 2, stk. 1, er ein avleiðing av broytingini í § 1.

*Til stk. 2*
Orðaljóðið í ásetingini er hitt sama sum í galdandi lóg og við lógaruppskotinum verður ikki lagt upp til nakra broyting í mun til galdandi áseting. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til ásetingina í løgtingsmáli LM-130/2013, har tað stendur:

"Grundarlagið fyri avgjaldinum verður lýst. Grundarlagið er vektin á tikna kruvda alifiskinum, umroknað til miðal altjóða marknaðarprís í sama mánað."

*Til stk. 3*
Orðaljóðið í ásetingini er hitt sama sum í galdandi lóg og við lógaruppskotinum verður ikki lagt upp til nakra broyting í mun til galdandi áseting. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til ásetingina í løgtingsmáli LM-130/2013, har tað stendur:

“Hvør miðal altjóða marknaðarprísur skal brúkast í sambandi við uppgerð av marknaðarvirðinum, verður ásett við átekning í fíggjarlógini til játtanina í fíggjarárinum.”

*Til stk. 4 og stk. 5*
Í § 2, stk. 4, verður skotið upp at gera miðal framleiðslukostnaðin í vinnuni upp triðja hvørt ár. Framleiðslukostnaðurin verður roknaður við støði grannskoðaðu ársroknskapunum hjá feløgunum eftir leistinum í skjali 1.

Tað merkir, at ein miðal framleiðslukostnaður fyrstu ferð verður gjørdur upp, soleiðis at hann kann verða kunngjørdur 1. januar 2025. Roknskapartøl fyri 2023 verða nýtt til uppgerðina. Sambært § 2, stk. 5, verður miðal framleiðslukostnaðurin prístalsviðgjørdur millumliggjandi ár, við støði í brúkaraprístalinum, B, frá Hagstovu Føroya, ið vigar 50% í uppgerðini, meðan vøksturin í fóðurprístalinum, F, vigar 50%. Ásetingin er úrslit av semjuni millum politisku flokkarnar, ið eru partar av langtíðarsemjuni.

Í skjali 2 verður leisturin, ið prístalsviðgjørt verður eftir, lýstur.

Ítøkiliga merkir hetta, at metti miðal framleiðslukostnaðurin, PK, verður kunngjørdur hin 1. januar 2026 og 1. januar 2027. Síðani verður miðal framleiðslukostnaðurin roknaður av nýggjum og kunngjørdur hin 1. januar 2028.

*Til stk. 6*
Við hesum verður heimilað landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um, hvørji roknskapartøl skulu latast inn. Ásetingin er lík § 2, stk. 4, í galdandi løgtingslóg.

*Til stk. 7*
Skotið verður upp, at miðal framleiðslukostnaðurin verður almannakunngjørdur á heimasíðuni hjá avvarðandi aðalráði tann 1. januar. Framleiðslukostnaðurin verður fyrstu ferð almannakunngjørdur 1. januar 2025 og síðani verður prístalsviðgjørdi framleiðslukostnaðurin, PK, kunngjørdur har næstu tvey árini.

**Til § 3**
*Til stk. 1*
Í galdandi løgtingslóg er ásett, at “Gjaldið eftir § 2 verður ásett sum ásett í skjali 2”. Sambært lógaruppskotinum verður skotið upp at áseta gjaldið sambært skjali 3.

Skotið verður upp at tillaga verandi skipan soleiðis, at ovastu stigini verða tikin burtur.

*Gamla skipanin – galdandi lóg*
- Er P minni enn K, er gjaldið 0,5%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K, men minni enn K pluss 5 kr., er gjaldið 2,5%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 5 kr., men minni enn K pluss 15 kr., er
- gjaldið 5,0%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 15 kr., men minni enn K pluss 20 kr., er
- gjaldið 7,5%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 20 kr., men minni enn K pluss 25 kr., er
- gjaldið 10,0%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 25 kr., men minni enn K pluss 30 kr., er

- gjaldið 12,5%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 30 kr., men minni enn K pluss 35 kr., er
- gjaldið 15,0%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 35 kr., men minni enn K pluss 40 kr., er
- gjaldið 17,5%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 40 kr., er gjaldið 20,0%.

*Nýggja skipanin - lógaruppskotið*
P er miðal marknaðarprísurin í DKK pr. kg., og K er metti miðal framleiðslukostnaðurin í DKK pr. kg.

- Er P minni enn K, er gjaldið 0,5%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K, men minni enn K pluss 5 kr., er gjaldið 2,5%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 5 kr., men minni enn K pluss 15 kr., er gjaldið 5,0%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 15 kr., er gjaldið 7,5%.

Talvan niðanfyri er dømi, ið vísir gjaldið treytað av altjóða marknaðarprísinum, treytað av at miðal framleiðslukostnaðurin, K, er 52,37 kr.

| **Prísur** | | **Gjald** |
|---|---|---|
| P<K | P < 52,37 kr. | 0,5% |
| K ≤ P < K+5 | 52,37 kr. ≤ P < 57,37 kr. | 2,5% |
| K+5 ≤ P < K+15 | 57,37 kr. ≤ P < 67,37 kr. | 5,0% |
| P≥K+15 | P ≥ 67,37 kr. | 7,5% |

*Til stk. 2*
Orðaljóðið í ásetingini er hitt sama sum í galdandi lóg og við lógaruppskotinum verður ikki lagt upp til nakra broyting í mun til galdandi áseting.

Ásetingin er neyvt hin sama sum § 2, stk. 5, í upprunaligu løgtingslógini frá 2014. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til ásetingina í løgtingsmáli LM-130/2013, har tað stendur:

“Í teimum førum, har talan er um tøku av sjúkum fiski, sum ikki kann seljast til vanligan marknaðarprís, og sum landsdjóralæknin hevur álagt at fremja, verður onki avgjald rindað.“

*Til stk. 3*
Orðaljóðið í ásetingini er hitt sama sum í galdandi lóg og við lógaruppskotinum verður ikki lagt upp til nakra broyting í mun til galdandi áseting. Hetta er sama áseting sum § 2, stk. 6, í upprunaligu løgtingslógini. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til ásetingina i løgtingsmáli LM-130/2013, har tað stendur:

“Ásett verður, at alarar mánaðarliga skulu upplýsa TAKS um, hvussu nógv teir taka av alifiski. Vektin, sum skal upplýsast TAKS, er tann kruvda vektin. Hendan verður síðani, saman við altjóða marknaðarprísinum, brúkt til at rokna marknaðarvirðið og tøkugjaldið.”

*Til stk. 4*
Orðaljóðið í ásetingini er hitt sama sum í galdandi lóg og við lógaruppskotinum verður ikki lagt upp til nakra broyting í mun til galdandi áseting. Talan er í stóran mun um somu áseting

sum § 2, stk. 7, í upprunaligu løgtingslógini frá 2014, tó við smærri tekniskum broytingum í 2023. Víst verður til serligu viðmerkingarnar í løgtingsmáli LM-130/2013, har tað stendur:

"Hóast tøkan skal upplýsast mánaðarliga, verður gjaldið einans rindað pr. ársfjórðing. Hetta er fyri at minka um umsitingarligu avleiðingarnar av uppskotinum."

Víðari verður víst til serligu viðmerkingarnar til broytingarlógina frá 2023, sbr. LM-093/2022, har tað stendur:

"§ 2, stk. 7, í løgtingslógini um loyvisgjald á alivinnu er ásett, at tøkugjaldið fellur til gjaldingar í fýra gjøldum ávikavist 1. februar, 1. mai, 1. august og 1. oktober við gjaldfreist tann 20. í mánaðinum. Endamálið við hesum partinum av lógaruppskotinum er at rætta ein gamlan feil. Longu tá lógin varð samtykt á fyrsta sinni, var ætlanin, at gjaldingin av tøkugjaldinum skuldi gerast pr. ársfjórðing eins og við meirvirðisgjaldinum, t.e. at fjórða gjaldið skuldi fella til gjaldingar 1. november við gjaldfreist tann 20. í mánaðinum. Sostatt er talan um eina tekniska rætting viðvíkjandi rindanini av tøkugjaldinum. Í § 1, nr. 2, stk. 4, í broytingaruppskotinum verður skotið upp, at fjórða árliga gjaldið skal fella til gjaldingar 1. november heldur enn 1. oktober. TAKS og alivinnan virka longu nú sum um gjaldfreistin er 1. november."

**Til § 4**
*Til stk. 1 og stk 2*
Orðaljóðið í ásetingini er hitt sama sum í galdandi lóg og við lógaruppskotinum verður ikki lagt upp til nakra broyting í mun til galdandi áseting.

Ásetingin gjørdist partur av løgtingslóg um loyvisgjald á alivinnu við løgtingslóg nr. 75 frá 1. juni 2023 um broyting í løgtingslóg um loyvisgjald á alivinnu. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til ásetingina í løgtingsmáli LM-093/2022, har tað stendur:

"Í § 1, nr. 2, verður skotið upp at seta inn nýggja § 2b. Við § 2 b, verður skotið upp, at 2% av inntøkunum frá gjaldinum falla til kommunurnar. Sambært uppskotinum ásetur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum nærri reglur um, hvussu peningurin frá gjaldinum verður býttur millum kommunurnar. Býtið verður ásett við støði í eini útrokning av lækkingini í inntøkuni frá partafelagsskatti í teimum kommunum, sum fáa lægri partafelagsskatt vegna broyting í tøkugjaldinum við hesum lógaruppskoti. Meginreglurnar í kap. 4 og 5 í skattalógini um tilhalds- og atvinnukommunur verða nýttar sum ein treyt í býtinum.

Harumframt er ætlanin, at 1% av inntøkunum frá tøkugjaldinum fer til at raðfesta gransking til frama fyri aling í Føroyum. Endamálið er at stuðla upp undir granskingarvirksemið á aliøkinum í breiðari merking. Tað kundi t.d. verið ávirkan frá aling á havumhvørvi, laksalús ella aling til havs o.s.fr. Hugsanin er, at granskingarráðið umsitur peningin, og tekur støðu til, hvørjar granskingarverkætlanir kunnu fáa stuðul. Sambært § 11 í løgtingslóg um ráðgeving og stuðul til gransking, menning og nýskapan, kunnu allar stuðulsskipanir, sum hava til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til gransking, menning og nýskapan, verða lagdar til fyrisitingina, smbr. § 15 í løgtingslógini. Granskingarráðið heldur peningin, ið er tilskilaður frá tøkugjaldinum, atskildan frá øðrum játtanum."

**Til § 5**
*Til stk. 1-4*
Prístalsviðgjørdi framleiðslukostnaðurin, PK, verður uppgjørdur eftir einum føstum leisti, sum er lýstur í skjali 2. Til tess at útrokna fóðurprístalið F, er tørvur á heimild til at krevja inn upplýsingar um fóðurprísir frá vinnuni, ið skulu nýtast til endamálið.

1. januar 2025 verður miðal framleiðslukostnaðurin K ásettur fyrstu ferð eftir hesi lóg. Í 2026 og 2027 skal K prístalsviðgerast, og fáa vit tá metta miðal framleiðslukostnaðin PK fyri hesi bæði árini. Fyri at gera hesar útrokningar, er neyðugt, at landsstýrismaðurin rættstundis fær upplýsingar um fóðurprísir. Upplýsingarnar um fóðurprísir skulu lastast landsstýrismanninum í seinasta lagi 10. desember á hvørjum ári. Hetta merkir, at tá fyrsta framskrivingin skal gerast móti ársenda í 2025, skal landsstýrismaðurin hava kravdu upplýsingarnar í seinasta lagi 10. desember 2025.

Fyri at fáa til vegar eitt fóðurprístal F, er neyðugt við søguligum dátum og tí verður biðið um fóðurupplýsingar fyri tíðarskeiðini 1. november 2022 til 31. oktober 2023, 1. november 2023 til 31. oktober 2024 og 1. november 2024 til 31. oktober 2025. Hetta eru árligar uppgerðir, hóast tær ikki fylgja kalendaraárinum. Hetta er fyri at fóðurtølini skulu verða so nýggj sum til ber, tá tey verða brúkt til at útrokna fóðurprístalið F við.

*Til stk. 5*
Í stk. 5 verður skotið upp at geva landsstýrismanninum heimild til, tá tørvur er á tí, at krevja upplýsingar frá vinnuni, ið kunnu verða við til at sanna prísásetingina á fóðri í handli millum nærstandandi partar, sbrt. 37 a í skattalógini. Talan er um skrivligt skjalprógv fyri prísáseting sbrt. § 118 a, stk. 4 – sonevndu transfer pricing dokumentatiónina fyri transaktiónina, ið viðvíkur sølu av fóðri.

*Til stk. 6*
Skotið verður upp at geva heimild til at áseta nærri reglur um latan av upplýsingum um prís á fóðri.

**Til § 6**
*Til stk. 1 og stk. 2*
Í verandi lóggávu eru ongar ásetingar um eftirlit og eftirlitsmyndugleika.

Eftir at framleiðslukostnaðurin er vorðin partur av løgtingslóg um loyvisgjald á alivinnu, er uppgerðin nú vorðin treytað av, at vinnan letur neyðugu upplýsingarnar. Hetta sama er galdandi í mun til latan av upplýsingum um fóðurkostnað. Nýggju tættirnir merkja, at tørvur er á heimildum, ið kunnu tryggja eftirlit við nýggju skipanini.

TAKS er eftirlitsmyndugleikin, og hava øll, ið eru fevnd av hesi lóg, skyldu at leggja fyri TAKS tey skjøl, ið kunnu verða kravd til sannan av uppgerðini av gjaldinum, heruppií eisini uppgerðini av framleiðslukostnaðinum.

**Til § 7**
Orðaljóðið í ásetingini er hitt sama sum í galdandi lóg og við lógaruppskotinum verður ikki lagt upp til nakra broyting í mun til galdandi áseting.

**Til § 8**

*Til stk. 1 og stk. 2*

Orðaljóðið í ásetingini er hitt sama sum í galdandi lóg og við lógaruppskotinum verður ikki lagt upp til nakra broyting í mun til galdandi áseting.

Talan er um áseting um pantiheimildir.

**Til § 9**

Eftir verandi løgtingslóg er heimild til at áleggja sekt upp á 1000 kr. afturat tøkugjaldinum, um upplýsingar um mánaðarligu tøkuna ikki verða latnar TAKS innan ásettu freistina.

Eftir at framleiðslukostnaðurin er vorðin partur av løgtingslóg um loyvisgjald á alivinnu, er uppgerðin nú vorðin treytað av, at vinnan letur neyðugu upplýsingarnar. Hetta sama er galdandi í mun til latan av upplýsingum um fóðurkostnað. Nýggju tættirnir í tøkugjaldinum merkja, at tørvur er á heimildum, ið kunnu nýtast at fáa neyðugu upplýsingarnar til høldar, skuldi tørvur verið á tí.

Sambært stk. 1 kann landsstýrismaðurin áleggja tí, sum ikki letur, ella ikki rættstundis letur, landsstýrismanninum upplýsingar, sum kunnu krevjast sambært § 2, § 5 og § 6, dagliga ella vikuliga sekt til undanlátið ella brotið heldur uppat.

§ 2 og § 5 í lógaruppskotinum snúgva seg um latan av upplýsingum um framleiðslukostnað og miðal fóðurkostnað pr. kilo.

§ 6 í lógaruppskotinum ásetur reglur um latan av upplýsingum í sambandi við eftirlitsuppgávuna.

Sambært stk. 2 koma løgfrøðiligir persónar undir revsiábyrgd eftir reglunum í 5. kapitli í revsilógini.

**Til § 10**

Í § 10 verður ásett at tann, sum tilætlað ella av grovum ósketni gevur ófullfíggjaðar, skeivar ella villleiðandi upplýsingar ella tigur um viðurskifti, sum hava týdning fyri mál eftir § 2, § 5, kann verða revsaður við sekt, um harðari revsing ikki kann ásetast eftir aðrari lóg.

**Til § 11**

Eftir uppskotinum skal lógin fáa gildi 1. januar 2025. Samstundis fer løgtingslóg nr. 64 frá 15. mai 2024 um loyvisgjald á alivinnu, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 75 frá 1. juni 2023, úr gildi.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, 5. apríl 2024

**Høgni Hoydal**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Semjuskjalið
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: